J.Nr.: 16/01074
Avgerð.nr.: 3
Dagfesting.: 21.desember 2016

Mál um gjaldsskyldu fyri røktarheimspláss hjá borgara

Markamótsnevndin hevur fingið mál frá einum kommunalum samstarvi um, hvør hevur gjaldskyldu – Almannaverkið ella avvarðandi kommunala samstarv – viðvíkjandi borgara, ið búði á røktar- og ellisheimi í einum *øðrum* kommunalum samstarvi. Semja er helst um, at hetta kommunala samstarv, ið hýsti borgaranum ikki hevur fíggjarliga ábyrgd.

Sum skilst hevði borgarin paranoida psykosu, og tað tykist vera á hetta, at kommunala samstarvið grundar ta fatan, at Almannaverkið eigur at rinda útreiðsluna fyri uppihaldið á røktar- og ellisheiminum, tí § 32 í forsorgarlógini sigur m.a., at "Vardur bústaður kann veitast persónum við týðandi ... *sálarligum breki*..."... og sum tørva hjálp og stuðul til vanligt dagligt virksemi, umframt møguliga røkt." (okkara framhevjingar)

Sum Markamótsnevndin hevur fingið málið upplýst, var sálarfrøðiliga støðan hjá borgaranum ikki ein stórvegis trupulleiki undir uppihaldinum á røktar- og ellisheiminum. Borgarin var til at hava við at gera bæði móti starvsfólkum og búfólki, og honum dámdi væl á heiminum.

Ikki er óvanligt, at búfólk á røktarheimum hava sálarfrøðiligar trupulleikar, so sum manio-depressiva ella paranoida psykosu, og sum nevnt skal eitt ávíst sjúkustig (sverheitsgrad) til, áðrenn kravið um týðandi sálarligt brek er lokið

Markamótsnevndin heldur tí ikki, at talan var um, at kvalifiseraða kravið í § 32 um týðandi sálarligt brek var lokið, ið kundi gjørt serligt búpláss undir landinum aktuelt.

Sostatt er kommunala samstarvið næst til at bera útreiðslurnar heldur enn Almannaverkið. Hetta er kortini einans við støði í markamótinum millum § 13 í Løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. og § 32 í forsorgarlógini.

Markamótsnevndin fer ikki at meta um onnur viðurskifti, ið evt. hava ávirkan á gjaldsskylduna.

Bárður Larsen (form.)

Ása Olsen

Katrin Danielsen